umborð

# Teir vinna og skapa arbeiði

**Myndirnar, sum vit prenta í VikuskiftisSosialinum í dag, eru tiknar umborð á ísfiskatrolaranum Vestmenningi. Skipið, sum sæst í sjónum og sum er "makkarin" hjá Vestmenningi, er ísfiskatrolarin Fram**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo



*Teir hava hálað, og nógvur upsi er í*

Vestmenna hevur leingi verið trolarabygd burtur av, um vit so kunnu siga. Fleiri ísfiskatrolarar eru heimahoyrandi á staðnum, og tað merkir, at sjófólkið í Vestmanna og í bygdunum nærindis hevur drúgvar royndir á troldekki. Aðrar bygdir, eitt nú Toftir og Klaksvík, eru meira kendar fyri sína línu-og útróðrarvinnu.

Men tíðin stendur ikki í stað. Viðurskifti broytast, og skip skifta eigarar.

Vestmenningar eiga í dag eisini línubátar, og á Toftum sigla menn ikki bara við línubátum longur ella troyta útróður. Stór skip eru komin til bygdar, bæði langfaraskip og pelagisk skip.

Í Klaksvík hevur línu-og útróðrarvinnan altíð havt stóran týdning, men klaksvíkingar hava í mong ár átt bæði ísfiskatrolarar, verksmiðjuskip og pelagisk fiskifør.

Í VikuskiftisSosialinum í dag prenta vit nakrar frálíkar myndir, sum eru tiknar umborð á ísfiskatrolaranum Vestmenningi. Tað er ungi kvívíkingurin, Karstin Vang, sum hevur tikið hesar myndir.

Karstin er 21 ára gamal, sonur Jens Kristian og Jóhonnu Vang, sum bæði starvast á Sosialinum. Jens Kristian er kendi myndamaðurin – og Jóhanna er dugnaliga skrivstovukvinnan.

Myndirnar hjá Karstini eru góðar, hóast hann ikki hevur gjørt nakað serligt við myndatøku. Men kanska liggur tað bara í blóðinum, sum vit plaga at siga.

Næraberg og seinni Atlantic Navigator gjørdust skúlaskipini hjá unga kvívíkinginum, sum hjá so mongum øðrum ungdómi, ið leitaði sær út á hav. Nú hevur Karstin fastan kjans við Vestmenningi.

Myndirnar lýsa ein part av sjólívinum.

Vit síggja menn á dekkinum, tá ið hálað verður, og vit síggja menn á verksmiðjuni og í lastini.

Ein partur av tí at sigla við fiskiskipi er, at tú av og á tekur tær nakrar fiskar heim við. Onkur greipar, og kanska tekur onkur sær nøkur fiskafløk. Hetta er góður døgurðamatur heima við hús.

Veturin er farin at halla, og tað stundar móti vári. Mangan er buldrasligt á skipsdekki í ringastu tíð av árinum, men so mikið betri eru løturnar í tí góðu tíðini av árinum.

Tá ið menn eldast umborð, er tað serliga rullið, sum er teirra størsti trupulleiki.

Ísfiskavinnan gevur monnum sína inntøku og skapar nógv arbeiði uppi á landi, bæði í framleiðslu-, tænastu-og flutningsvinnuni.

Teir, sum sigla við ísfiskatrolara undir Føroyum, eru vanliga tveir túrar umborð og ein í landi.

"Skalt tú sigla, mást tú loysa", sum eitt valevni, ið er skipari á rækjubáti, segði undir valstríðnum seinast.

Og loysast má, um nakað skal fáast burtur úr – til sjófólk, arbeiðsfólk og tey, sum eru í avleiddu vinnunum.

Ella – sum onkur hevur tikið til: "Vit kunnu ikki sleppa filéini, fyrr enn vit sita við idéini".

Enn er fiski-og alivinnan ryggurin í okkara útflutningi, og soleiðis verður tað ivaleyst í mong ár aftrat.



*Karstin og Jákup Aksel lata seg í oljuklæðini*



*Jákup Aksel syrgir fyri, at fiskurin er fyrstafloks*



*Karl Isaksen á verksmiðjuni*



*Nakrir ræstir fiskar eru góðir á døgurðaborðinum*